FÍGGJARMÁLARÁÐIÐ
Ministry of Finance

Løgtingið
Tinghúsvegur 1-3
Postboks 208

Tórshavn, tann: 21. november 2025
J.nr.: 22/13718-90
Viðgjørt: TM, BAB

Stílað: Fíggjarnevndini

Viðvíkjandi løgtingsmáli nr. 034/2025: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um eftirløn (Eftirlønarlógin) (Greiðari ásetingar um, nær útgjøld byrja og inngjøld steðga, heimildin fyri frítøku í sambandi við tíðaravmarkað starv verður strikað, umframt tekniskar broytingar og fylgibroytingar av broyttari lóggáva á almannaøkinum)

Fíggjarmálaráðið er vorðið varugt við, at neyðugt verður at leggja eina orðing afturat tí einu greinini í lógaruppskotinum, sum Fíggjarmálaráðið hevur lagt fyri Løgtingið.

Talan er um § 1, nr. 15 í lógaruppskotinum. Broytingin snýr seg um uppskotini til nýggju stk. 10-12 í § 9 í eftirlønarlógini.

Í lógaruppskotinum verður skotið upp at seta soljóðandi nýtt stk. 12 í § 9 í eftirlønarlógini: "*Ásetingarnar í stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. stk. 11.*"

Fíggjarmálaráðið mælir til, at ein orðing verður løgd aftrat uppskotinum omanfyri til nýtt stk. 12 um, at *fáa eftirlønarveitarar ikki onnur boð frá eftirlønarsamansparara í sambandi við útgjald sbrt. stk. 11, verður ásett, at 15 prosent av samansparda virðinum verður goldið út sum kapitalútgjald, 45% sum lívrenta og restin sum lutaeftirløn.*

Harafturat hevur Fíggjarmálaráðið varnast eitt komma, sum av misgáum er komið skeivt fyri millum orðini "áðrenn" og "útgjald" í uppskotinum til nýtt 10 í § 9 í eftirlønarlógini. Í viðhefta uppskoti til broyting er hetta rættað.

Eg fari tí at mæla Fíggjarnevndini til at gera eina broyting í lógaruppskotinum.

Fíggjarmálaráðið metir tað vera neyðugt, at eftirlønarveitarar í teimum førum, har neyðugt er at gjalda út eftirløn sbrt. uppskotinum til nýtt stk. 11 í eftirlønarlógini orsakað av vantandi upplýsingum um peningastovn og kontonummar, fáa ásett eitt ávíst býti, sum útgjaldið av eftirløn skal býtast eftir á ávikavist kapitalútgjald, lutaeftirløn og lívrentu. Hendan ásetingin verður sostatt bara viðkomandi í teimum førum, har ið eftirlønarveitarar ikki fáa goldið út eftirløn á annan hátt enn sbrt. uppskotinum til nýtt stk. 11 í § 9.

Uppskot til orðing av broytingaruppskoti:

§ 1, nr. 15, verður orðað soleiðis:

"**15.** Í § 9 verða sum stk. 10-12 sett:
"*Stk. 10.* Eftirlønarsamansparari skal í sambandi við útgjald sbrt. stk. 1 og í sambandi við fráboðan sbrt. stk. 2 í seinasta lagi tveir mánaðir áðrenn útgjald byrjar, lata eftirlønarveitara upplýsingar um peningastovn og kontonummar, har samansparda eftirlønin skal flytast til.
Stk. 11. Eru neyðugu upplýsingarnar um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnar eftirlønarveitaranum, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjaldið á depotkonto, sum eftirlønarveitari kann stovna til eftirlønarsamanspararan, og sum ikki fær tilskrivað avkast. Eru upplýsingar um peningastovn og kontonummar sbrt. stk. 10 ikki latnar eftirlønarveitara, tá ið útgjald byrjar, kann eftirlønarveitari flyta útgjald á sentrala og løgliga góðkenda, almenna konto hjá eftirlønarsamansparara, sum er knýtt at skipanini Vangin.
Stk. 12. Ásetingarnar í stk. 2, um býtið av samansparda virðinum útgjaldsdagin, og í stk. 6, um útgjøld, eru galdandi fyri útgjøld sbrt. stk. 11. Fær eftirlønarveitari ikki onnur boð frá eftirlønarsamansparara í sambandi við útgjald sbrt. stk. 11, verður ásett, at 15 prosent av samansparda virðinum verður goldið út sum kapitalútgjald, 45% sum lívrenta og restin sum lutaeftirløn.""

Tórshavn, 21. november 2025

Ruth Vang
Landsstýriskvinna í fíggjarmálum